

Tað, at Guðrun hevur sniðgivið uttan at hugsa um praktisku dimensiónina prógvar, at hon er ein sniðgevi við altjóða máti, staðfestu viðmerkjararnir hjá Rás2



Bátsmanshúgvan við pailletunum, sum veruliga er vorðin eitt hitt her heima í vetur. À mótashowinum var tað tó eitt mannfólk, sum var í henni. Her eisini við eini vælsitandi hvítari stúku



Sum vera man vóru Guðrun og Guðrun bæði glaðar og vælnøgdar eftir fantastiska flotta showið mánadagin. Øll reistust at klappa, og tær vórðu klappaðar út av »pallinum«

## Í MÜLLERS PAKKHÚSI UNDAN MÓTASHOWINUM:



Lotte Freddie, sum her tosar við Jón Brian Hvidtfeldt, er ein mótaguru í Danmark. Tað, sum henni dámar, verður góðtikið, og tað, sum henni ikki dámar, hevur nærum ongan møguleika at sláa ígjøgnum. Tíbetur hevði hon bert positiv orð um tiltakið hja G&G



Sabine Poupinell er eitt kent navn innan danska mótaheimin. Guðrun Ludvig hevur arbeitt hjá henni í Keypmannahavn. Hon segði seg vera sera erna av tiltakinum, sum G&G høvdu fingið uppá beinini



Tveir av japonsku innkeyparunum saman við Guðrun Ludvig í Mullers Pakkhúsi



Teitur sang fyri gestunum vesturi í hangarinum, og Uni Debes stóð fyri tónleikaliga partinum í Müllers Pakkhúsi





Martin Jørgensen, maður Alexandru Prinsessu, var eisini komin til Føroya við leigaða flogfarinum. Her sæst hann drekka sjampagnu við føroyskari rabarbusaft saman við tveimum donskum sniðgevum